# Enterprise Highlighting

**Taluvirknar heimasíður**



***Heimasíður, ið ØLL kunnu lesa***

***Fáið fleiri vitjanir á tykkara heimasíðu***

Føroyar eru í dag eitt sera framkomið KT-land við øllum teim fyrimunum og vansum, hetta ber við sær. Í nærmastu framtíð skulu allir føroyingar kunna skráseta og fyrispyrja upplýsingar við talgildum samleika. Hetta krevur samstundis, at allir føroyingar noyðast at kunna brúka telduna hereftir.

Hetta er tíverri nakað, ið ikki øll hava førleikan til vegna lesitrupulleika.
Hetta eru fólk, ið **heldur skulu lesa við oyrunum enn við eygunum.**

Tískil er neyðugt, at **tykkara** heimasíða eisini kann lesa allan tekst upp fyri teimum.

**ReadSpeaker** ger hetta møguligt, bæði á teldum og iPad, og somuleiðis á iPhone og øðrum framkomnum fartelefonum.
Ein nýggj føroysk teldutala við bæði mann- og kvinnurødd, ið er heilt nátúrlig, er liðug og klár til nýtslu, so eisini føroyingar kunnu brúka henda møguleika fult út.

Eingin kanning hevur verið her á landi, hvussu stórur tørvurin er. Men í øllum grannalondum okkara hava kanningar víst, at uml. 15 til 20 prosent av fólkatalinum hevur lesitrupulleikar av ymsum slag.
Hesin stóri bólkurin fær ikki lisið heimasíðurnar, men má biðja onnur um hjálp til hetta.

**Hví teldutalu:**

Hesum verður greitt frá í filmi á YouTube her. Men best er altíð at kunna síggja og hoyra hetta á einari framløgu, so um áhugi er fyri hesum, og møguleiki er at seta ein tíma av til hetta endamál, so komi eg og kunni tykkum um, hvussu tykkara heimasíða kann nýtast av øllum brúkarum.

Hetta er heilt óbindandi og ókeypis.

**ReadSpeaker kann:**

- ✓ **Lesa allan tekst á heimasíðum**
- ✓ **Lesa PDF og Word skjøl á heimasíðum**
- ✓ **Lesa oyðubløð á heimasíðum**
- ✓ **Lesir á meiri enn 30 málum**
- ✓ **Litmerkir tekstin, meðan lisið verður**

Eg vil loyva mær at seta meg í samband við tykkum aftur innan 14 dagar, men sjálvandi eru tit eisini vælkomin at ringja ella senda teldupost um eina vitjan.

***Soleiðis síggja nógvir brúkarar telduskíggjan:***



Meiri kunning er at finna á heimasíðu okkara:
hh-support.com
har tað ber til at royna tøknina.



Høgni Højgaard

HH-Support